

# Nógvir írar arbeiðsleysir

Í síðsta mánað var arbeiðsloysið í Írlandi 12,4 prosent, og so stórt hevur tað ikki verið síðani í februar í 1995. Tað sigur vinnumálaráðið í Dublin. Sagt verður, at nú ummánaðarskiftið vóru rúmliga 440.000 fólk skrásett arbeiðsleys ella 4.300 fleiri enn ein mánað frammanundan. Vinnumálaráðið sigur, at higartil í ár hava knappliga 193.000 fólk mist arbeiðið og eru skrásett hjá arbeiðsloysisskipanini. Írski forsætisráðharrin, Brian Cowen, hevur sagt, at arbeiðsloysið kemur eftir øllum at døma upp á millum 15 og 15,5 prosent um ársskiftið.



*Enn er talan bert um eina fyribilsloysn, har Rúsdrekkasøla Landsins hevur leigað seg inn í Miðlon í seks mánaðir. Hvat verður aftaná, er ikki til at vita. – Enn loysa vit trupulleikar, so hvørt sum teir stinga seg upp, meðan flytingin stendur við. Eg eri als ikki komin til at hugsa um, hvat verður gjørt aftaná. Fyrst mugu vit koma upp á pláss her, sigur Elsa Maria Holm Olsen, stjóri í Rúsdrekkasølu Landsins.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Rúsan spennir seg út í Miðlon

**Rúsdrekkasøla Landsins flytur í dag inn í nýggj høli í Miðlon. Men tað eru ikki smáar ætlanir Rúsan hevur í Miðlon. Nógv umbygging skal gerast og at enda stendur Rúsan í stórum snotiligum hølum**

FLYTING

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Einkarsølan í Føroyum flytur nú inn í nýggj høli í Miðlon. Fyribils er leigu-avtala gjørd fyri seks mánaðir, men hvat hendir eftir tað er enn ilt at gita um.

Avgerðin um at flyta einkarsøluna úr húsunum á Smyrilsvegi og yvir í hølini hjá Miðlon á Hoyvíksvegi kom eftir at HMP Consult í samstarvi við Dansk Bygnings Analyse staðfesti, at soppavøkstur var til staðar í bygninginum. Síðan hevur Dansk Bygningsanalyse, eftir áheitan frá leiðsluni í Rúsdrekkasøluni, gjørt tvær nýggjar kanningar.

Tann fyrra staðfesti, at talan var um víðfevndan soppavøkstur, og í seinastu kanningini, ið varð latin síðst í farnu viku var staðfest, at bygningurin ikki var egnaður sum arbeiðspláss í verandi líki. Føroyska Arbeiðseftirlitið hevur alla tíðina verið kunnað um úrslitið av kanningunum, og í seinastu kanningarniðurstøðuni heitti Dansk Bygningsnalyse á føroyska Arbeiðseftirlitið um at steðga virkseminum í bygninginum til viðurskiftini eru nærri kannað.

Tí var Rúsdrekkasøla Landsins stongd týsdagin, og arbeiðið at leita eftir nýggjum hølum fór í gongd. Hetta arbeiðið kom skjótt á mál, og longu í dag er Rúsan flutt inn í nýggju hølini.

### Stórt rúm

Hóast Rúsan flytur inn í nýggju hølini í dag, verður tað við avmarkaðum vøruúrvali og plássi fyrstu dagarnar. Talan er um innastu hølini í niðaru hædd.

Tó longu í næstu viku verður ætlandi eisini latið upp í hølunum við síðuna av, har BabySam í løtuni heldur til. Um góðar tríggjar vikur verður fløskumóttøkan eisini sett upp í hølunum har Kvik køkar helt til.

Í alt fær Rúsan størri og snotiligari høli enn áðrenn, umframt at parkeringsviðurskiftini kring Miðlon mugu sigast vera munandi betri enn á Smyrilsvegi.

### Fyribils bara fyribils

Stjórin í Rúsdrekkasølu Landsins, Elsa Maria Holm Olsen, greiðir tó frá, at tað enn er alt ov tíðliga at tosa um hvørt hetta verður ein varandi loysn.

- So langt eru vit als ikki komin enn. Tað liggja eisini tekningar klárar fyri eini ætlaðari útbygging í hølunum á Smyrilsvegi, sum vit tó ikki eru komin til, greiðir hon frá.

Sostatt er talan fyribils bara um eina fyribilsloysn, meðan húsini á Smyrilsvegi verða umvæld og soppavøksturin verður fingin út.



# Miðlon fegnast um Rúsuna

**At Rúsdrekkasøla Landsins flytur inn í Miðlon er ein góð avtala fyri báðar partar. Skuldi ein varandi avtala blivið aktuell, er Miðlon eisini klárt at húsa Rúsuni sigur stjórin í Miðlon**

FLYTING

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

At Rúsdrekkasøla Landsins nú flytur inn í Miðlon er ein góð avtala fyri báðar partar. Tað er stjórin í Miðlon, Mads Andrias Winther, sannførdur um.

Fyri handlarnar í Miðlon merkir tað helst, at streymurin av fólki inn og út úr bygninginum verður munandi størri, og harvið eisini møguleikin fyri at fleiri kundar hyggja inn í teirra handlar.

Men enn er avtalan tó bert galdandi komandi hálva árið. Men skuldi tað verið soleiðis, at Rúsdrekkasøla Landsins ynskti at gera avtaluna varandi, er tað nokk eingin trupulleiki.

- Eg ivist ikki í at vit høvdu kunna funnið útav tí, skuldi Rúsdrekkasøla Landsins havt ynski um at gera avtaluna varandi, sigur Mads Andrias Winther, stjóri í Miðlon.